Sunnudagsskúli á Svangaskarði

Tað verður helst landsins størsti sunnudagsskúli, tá ið børn úr øllum ættum og ymsum kirkjum og samkomum í Føroyum streyma til Svangaskarð sunnudagin, 10. september. Bæði grasvøllurin og graslíkisvøllurin verða nýttir á hesum uttandura sunnudagsskúlanum

Hetta stóra sunnudagsskúla- og familjutiltakið er í sambandi við 1000-ára haldið fyri kristnitøkuni, og skuldi verið ein góður møguleiki at samskipa dagin, sum eina útferð fyri sunnudagsskúlan og familjuna.

Ein níggjumannað nevnd við fólkum úr ymsum missiónshúsum, kirkjum og samkomum um landið hevur í nakrar mánaðir fyrireikað tiltakið, og nú eru tey spent at vita, hvussu nógv børn og vaksin fara at koma.

Hesin serligi sunnudagsskúlin verður eitt sindur longri enn vanligt næstan 4 tímar. Men tað er ikki meir enn rímiligt, tá ið eitt nú suðuroyarbørn mugu ferðast langan veg fyri at vera við.

Byrjað verður klokkan 14 á graslíkisvøllinum

Har verður hornblástur, setanarrøða og ein spennandi sangleikur um Dávid og Goliat verður framførdur.

Klokkan 15 verður farið oman á graslíkisvøllin, har børn frá ymsum sunnudagsskúlum um landið fara at syngja, spæla dramaleik ella gera rørslur til sangir. Onkur klovnur verður eisini við. Børnini koma ikki bara at sita still, tey sleppa eisnini at røra seg. Tað verða ymsar kappingar og virksemi.

Børnini hava sjálvi matpakka og saft við. Tiltakið endar umleið klokkan 17:30, og tá verður eisini nógv sungið.

Sunnudagsskúlin á Svangaskarði hevur fingið heitið: „Verið sterk í Harranum!“ Ein sangur er eisni gjørdur til dagin, og hann fáa sunnudagsskúlarnir um landið sendandi, so tey kunnu læra seg hann, áðrenn tey koma á Svangaskarð.

Øll, sum verða við til uttandura-sunnudagsskúlan á Svangaskarði fáa eisini okkurt heim við sær aftaná. Hvat hetta er, fáa børnini ikki at vita enn, men fyri at tað skal vera nóg mikið til, er neyðugt, at teir einstøku sunnudagsskúlarnir boða fyrireikarunum frá, hvussu nógv koma frá teirra sunnudagsskúla. Tilmeldingin skal vera inni í seinasta lagi sunnudagin, 3. september.

Um tað ikki viðrar á Svangaskarði, verður tiltakið ístaðin í Ítróttarhøllini í Runavík.

J&K

Almenn móttøka

Í sambandi við at

– Felagið er 25 ár
– Vit eru flutt í nýggjan skrivstovu- og verkstaðsbygning
– Fyrst setti arbeiðsmaður Jógvan Lamhauge hevur 25 ára starvsdag

verður boðið til móttøku
í hølum okkara á Hjalla

fríggjadagin 25. august kl. 14.00 til 17.00

J&K Petersen

Sosialurin - 311820

Fyrstu oljuloyvini

Agip Denmark BV
Agip Denmark BV er partur av italska Eni-samtakinum. Eni er m.a virkið innan olju-/gassleiting og framleiðslu og eisini t.d. innan petrokemiska ídnaðin. Eni hevur virksemi í fleiri enn 70 londum, m.a. í Italia, Afrika, Norðsjónum, Kina og USA.

Amerada Hess (Faroes) Ltd.
Amerada Hess (Faroes) Ltd. er partur av amerikanska Amerada Hess-samtakinum. Var upprunaliga serliga virkið í Meksikoflógvanum og Norðsjónum, men hevur seinnu árini flutt virksemið til onnur lond eisini, t.d. Afrika og Asia. Kjarnuøkið fyri virksemið hjá Amerada Hess er tó bretski landgrunnurin, har felagið hevur verið virkið síðan olju- og gassvirksemið byrjaði í 1963.

Anadarko Faroes Company
Anadarko Faroes Company er partur av Anadarko Petroleum-samtakinum.

Anadarko Petroleum Corporation er amerikanskt oljufelagssamtak. Felagið er serliga virkið í Meksikoflógvanum, Alaska og eisini í Afrika og á Atlantsmótinum.

Ætlandi verður Anadarko-samtakið lagt saman við felagnum Union Pacific Resources.

P/F Atlantic Petroleum
Føroyskt, privat oljufelag, sum varð stovnað í 1998. Hetta er fyrsta loyvi hjá felagnum at leita eftir og framleiða kolvetni.

BG International Ltd.
BG International Ltd. er partur av BG-samtakinum (British Gas)

BG-samtakið er bretskt olju- og gass samtak, sum fæst við leiting og framleiðslu, eins og sølu av gassi til bretska marknaðin og altjóða marknaðir. Er virkið í fleiri londum, m.a. í Suðuramerika, Afrika og Miðeystri.

BP Amoco Exploration (Faroes) Limited
BP Amoco Exploration (Faroes) Limited er dóttirfelag hjá enska BP Amoco p.l.c.

Samtakið er virkið í Evropa, Norður- og Suðuramerika, Asia, Australasia og Afrika.

Størsti framleiðari av olju og gassi úr Norðsjónum og vestan fyri Shetland. Fyristøðufelag á Schiehallion feltinum vestanfyri Shetland.



DONG E&P A/S
DONG Efterforskning og Produktion A/S er partur av danska, almenna olju- og gass samtakinum DONG.

Høvuðsvirksemið hjá DONG E & P A/S er leiting eftir, framleiðsla og søla av olju og gassi. DONG-samtakið eigur gassrørleiðirnar, sum føra gass frá danska landgrunninum til danska marknaðin. DONG-samtakið eigur m.a. grønlendska Nunaoil A/S saman við grønlendska heimastýrinum. DONG er við í 2 loyvum í Grønlandi, partvís við beinleiðis luttøku og partvís sum partaeigari í Nunaoil A/S.

Enterprise Oil Exploration Limited
Enterprise Oil Exploration Limited er partur av Enterprise Oil-samtakinum.

Enterprise Oil-samtakið er enskt oljufelagssamtak, sum varð stovnað í 1984. Tað hevur serliga arbeitt í Norðsjónum, t.e. Stórabretlandi, Noregi og Danmark.

Seinnu árini hevur felagið eisini fingið loyvi í øðrum pørtum av heiminum, t.d. Meksikoflógvanum, Brasil og Kazakhstan.

Føroya Kolvetni P/F
Føroyskt, privat oljufelag, stovnað av føroyskum og útlendskum íleggjarum í 1998. Hetta er fyrsta loyvi hjá felagnum at leita eftir og framleiða kolvetni.

Phillips Petroleum Europe Exploration Ltd.
Phillips Petroleum Europe Exploration Ltd. er partur av Phillips-samtakinum.

Phillips-samtakið er privat amerikanskt oljufelagssamtak, sum varð stovnað í 1917. Hevur verið virkið í Noreg síðan 1969, tá tað fann Ekofisk, fyrsta oljuleiðin á norska landgrunninum. Phillips er virkið á bretska landgrunninum. Felagið er við í 2 loyvum í Grønlandi, og er fyristøðufelag í tí eina.

Statoil Færøyene AS
Statoil Færøyene AS er dóttirfelag hjá Den norske stats oljeselskap a.s.

Statoil er norskt landsoljufelag, sum varð stovnað í 1972. Statoil er høvuðsleiti- og framleiðslufelagið á norska landgrunninum, og hevur seinnu árini víðkað virksemið til eisini at umfata lond uttanfyri Noreg. Felagið er við í 2 loyvum í Grønlandi og er fyristøðufelag í tí eina loyvinum, har borað verður í løtuni.

Veba Oil and Gas GmbH
Veba Oil and Gas GmbH er partur av týska Veba AG Veba-samtakið hevur, umframt olju- og gassvirksemi, eisini annað virksemi, sum t.d. kemikaliuvirksemi.
Veba Oil and Gas GmbH tekur sær av altjóða upstream virkseminum hjá samtakinum. Varð stovnað í 1998 við at Deminex og Veba Oel E&P vórðu løgd saman. Er virkið í bretska og norska partinum av Norðsjónum.

DAGFØR TEG sosialurin HALT SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Í býin Í býin Í býin - altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin

Fríggja- og leygarkvøldið spæla RONNIE NIELSEN &CO DJ er ODDI 5'ARI frí.-, leyg.- og sunnukvøld frá kl. 17.00

Kaggin Kaggin Kaggin

www.kaggin.fo

fk Matseðilin

Hósdagin 24. august: Hakkibúffur
Fríggjadagin 25. august: Hamburgararyggur
Leygardagin 26. august: Lambasteik
Mánadagin 28. august: Kjøtfrikadellir
Týsdagin 29. august: Rivjasteik
Mikudagin 30. august: Stokt flesk
Kostnaður 32,- kr.

***

Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95

Matstovan í Hoyvík

NÁTT-BUSSURIN hjá Øssuri Christiansen

Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)

Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu

Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

sosialurin
www.sosialurin.fo

Norðoyggjar

Klaksvíkar Klubbi

Dansur verður leygarkvøldið 26. august
ÓLAVUR PRESLEY & VINMENN spæla

Klubbin hevur: POOLBORÐ BILLARDBORÐ ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALTDØGNIÐ-
AUTO 311234

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin

Lesið sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg

Vilja tygum vi› í Í b‡in - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur

Sosialurin - 311820